VIÐMERKINGAR

# Pensionistur vrakaður av Sunda Pensionistafelag vegna ov høgan aldur

**David Davidsen**
*Tjørnuvík*

Formaðurin í Sunda pensionistafelag noktaði mær at koma við til Íslands, tí hann segði meg vera ov gamlan.

Sostatt meti eg meg vera tveittan úr felagnum, tí eg eri komin ov høgt upp í árini. Tað harmaði meg almikið, og eg eri ikki sørt argur, at formaðurin í Sunda pensionistafelag, har eg havi verið limur í mong ár, noktaði mær at koma við til Íslands, tí hann metti meg at vera ov gamlan.

Hóast eg eri 92 ár, havi eg enn góða heilsu, og minninum og skilinum bilar einki.

Tí haldi eg tað vera eyðmýkjandi og beinleiðis brot á mannarættindini at nokta mær ein hugnaligan túr saman við vinum og kenningum. Er ikki aðalmálið hjá einum pensionstafelag at lætta um tilveruna hjá teimum gomlu – serliga einkjum og einkjumonnum.

Setti meg í samband við Sigvald Kristiansen, næstformann í landsnevndini og stóð hann púra spyrjandi. Ringdi eisini til ferðaleiðaran, sum býr í Suðuroy, og hann bað meg bara gjalda ferðaseðilin, so skuldi tað vera í lagi. Men formaðurin í Sunda pensionistafelag stóð við sítt – eg var ov gamal. Eisini havi eg tosað við pensionistar í øðrum norðurlondum, og siga teir, at hetta hevði ikki komið fyri hjá teimum. Teir øtaðust.

Nú bar so á, at íslendskir pensionistar komu til Tjørnuvíkar, og var eg tá ferðaleiðari teirra. Teir vóru so væl nøgdir, at teir bjóðaðu mær við teimum til Íslands, og hesum tók eg við. Paradoksalt fóru vit við sama farti sum Sunda pensionstafelag, og enntá sat eg saman við íslendsku pensionistunum tætt við sama matborð sum Sunda pensionistarnir. Soleiðis eydnaðist mær at koma aftur til Íslands, har eg havi so mong kær minni frá mínum arbeiðslívi.

Er tað blivið so, at ovara aldursmark verður sett til tess at kunna taka lut í virksemi felagsins, so er álvarslig misskiljing komin í.

Hetta er bæði órættvíst og vanærandi ímóti okkum, sum eru komin um tey níti. Verða vit so noydd at stovna annað pensionistafelag, sum bara eru fyri tey oman fyri níti. Tað kann ikki vera rætt.

Við hesum reglum mótmæli eg hesari avgerð formannsins og meti hetta at vera týðuligt brot á rættindini hjá 90-ára bólkinum. Havi tosað við Niclas Akraberg Poulsen, og frá honum frætta vit seinni.

Livst so spyrst.

# Jólamatiné í Havnar kirkju

**Konsertfelagið skipar fyri jólamatiné í Havnar kirkju leygardagin 11. desember kl. 11.30**

Fyri nørkum árum síðan fingu vit innan konsertvirksemið í Føroyum eitt nýtt tiltak, kallað matiné-fyrrapartskonsert. Tað var organisturin í Havnar kirkju Oddvør Johansen sum tók stig til hesar konsertir, sum nú er fastur táttur innan tónleikalívið í Havn.



Hesar matinéir eru sera góð tiltøk, har alskyns tónleikur og tónleikarar fáa innivist. Kór og orkestur, solo- og kamartónleikur, áhuga- og yrkisleikarar og føroyskir og útlendskir tónleikarar. At leggja eina konsert leygardag kl. 11.30 er væl funnið uppá. Tú kanst taka tær av løttum um morgunin, síðan hoyra góðan tónleik í Havnar kirkju og aftaná er tíð at fara til handils.

Í fyrstani var áhoyraratalið so sum so, men sum tíðin leið, so komu fleir og fleir fólk. Í dag eru tað heilt nógv sum leita sær í Havnar kirkju til matiné.



*Heiðrun Petersen er solistur*

**Jólamatiné**

Í fjør heitti Konsertfelagið á Oddvør við hugskotinum at gera eina matiné í desember mánaði við heitinum jólamatiné. Skráin skuldi setast saman við kórorkestur- og kamartónleiki, sum er góður at lurta eftir upp undir jól.

Hendan fyrsta jólamatinéin varð hildin leygardagin hin 20. desember 2003. Hon var sera væleydnað og nógv fólk komu at lurta.

Aftur í ár skipar Konsertfelagið fyri einari jólamatiné í Havnar kirkju. Tey sum spæla verða: Ein sangkvartett við Arinu Bischoff, Durítu Eliasen, Høgna Debes og Hans Debes. Oddvør Johansen, orgul.

Strúkiorkestur Tórshavnar Musikkskúla, stjórnað av Bernharði Wilkenson.

Solistar saman við orkestrinum verða Heiðrun Petersen og Jón Festurstein, bæði violin. Tórshavnar Manskór, stjórnað av Bjarna Restorff.

Hini sum syngja og spæla verða: Berghild Poulsen, sang, Andrea Heindriksdóttir, floyta og Árni Hansen, klaver.

# Konsertfelagið 25 ár



Konsertfelagið varð stovnað hin 19. desember 1979 og verður sostatt 25 ár fyrsta dagin.

Í fyrstu nevndina vóru vald Volker Immanuel Behrens, Kristian Meitil, Elin Súsanna Jacobsen, Ólavur Hátún og Árni Hansen. Hesi vóru eisini stigtakarar til felagið.

Konsertfelagið hevur gjøgnum hesi 25 árini skipa fyri hópin av kamarkonsertum, bæði við føroyskum og útlendskum tónleikarum.

Í márs í ár varð nýggj nevnd vald. Í henni sita: Monica Stauss Jeonsen, formaður, Ólavur Jakobsen, næstformaður, Árni Hansen, kassameistari, Christian Andreasen, skrivari og Poul Jákup Thomsen nevndarlimur.

Skráin fyri 2005 er um at vera liðug og kemur at síggja soleiðis út:

Januar:
Michala Petri, blokkfloyta og Lars Hanibal, gittar.

Februar:
Øssur Bæk, violin og Jóhannes Andreasen, klaver.

Apríl:
Kim Sjøgren, violin saman við pianisti.

September:
Toke Lund Christiansen, floyta og Elisabeth Westenholz, klaver.

Oktober:
Blásarakvartett Reykjavíkur.

November:
Kaare Norge, gittar.

Desember:
Jólamatiné í Havnar Kirkju.

# Øl-vinir

**Johan Mortensen**
*PF Restorffs Bryggjarí*



Nógvir Føroyingar kenna áhugafelagið **DANSKE ØL-ENTHUSIASTER**. Hetta felag er sera virkið í Danmark og hevur umleið 7.000 limir og við skjótt vaksandi limatali. Endamál felagsins er at nøra og kveikja áhugan fyri øli og at útvega dønum gott øl.

Tað er sera hugaligt at menn (kvinnur?) hava tikið stig til at stovna eitt føroyskt systurfelag og hevur felagið fingið heppna heitið **FØROYSKIR ØLVINIR**. Felagið fer at virka eftir sama leisti sum danska móðurfelagið.

**ØLVINIR** hava fyriskipað eina meting av Jólabryggjunum hjá føroysku bryggjaríunum, og er tað væntandi, at Ølvinir framyvir eisni fara at sammeta føroyskt og útlendstk øl, fyriskipa smakkiroyndum, bryggjarívitjanir osfr. Hetta hevur áhuga hjá øllum, sum væl dáma øl, og fremur tað eisini kappingarhugan millum bryggjaríini, tá kompetent fólk taka dagar ímillum framleiðslurnar.

Bert er tað spell, at okkara avoldaða rúsdrekkalóg forðar bryggjaríunum at lýsa við tess framleiðslum og yvirhøvur verða líki virkin sum útlendsk bryggjarí við marknaðarføring, kunning um øl og mat osfr., og so sjálvandi skal bryggjast øl sterkari enn 5,8%. Nær torir nakar politikari at taka stig til at broyta hesa lóg? Sum kunnugt kosta promillur atkvøður!

Vit ynskja Føroyskum Ølvinum gott skúm.